ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

BURTURRIKNIR UKRAINAR Í FØROYUM

# Stutt frágreiðing um heilsustøðu og gerandislív teirra



# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Samanumtøka | 4 |
| Føroyskt | 4 |
| English | 4 |
| Українська | 4 |
| Inngangur | 5 |
| Fyribyrgjandi tiltøk í Føroyum | 6 |
| Endamál við kanningini | 8 |
| Háttalag | 8 |
| Úrslit | 9 |
| Luttakarar | 9 |
| Lívsgóðska | 10 |
| Broytingar í sálarheilsu og gerandislívi hjá luttakarunum | 11 |
| Broytingar í sálarheilsu og gerandislívi hjá børnunum hjá luttakarunum | 12 |
| Vælferðartænastur | 14 |
| Samandráttur av svarum upp á opnu spurningarnar | 15 |
| Samanumtøka og niðurstøður | 16 |
| Keldur | 20 |

# Samanumtøka


## Føroyskt

Tá Russland tann 24. februar 2022 gjørdi innrás í Ukraina, flýddu fólk í túsundatali úr landinum. Føroyar valdu at taka ímóti ukrainskum flóttafólki og at veita teimum atgongd til skúlaverk, arbeiðsmarknað, og heilsutænastur. Hendan frágreiðing lýsir heilsustøðu og gerandislív hjá ukrainskum flóttafólkum í Føroyum, og hvat tey halda um tær tænastur, tey hava fingið. Frágreiðingin byggir á eina kanning, sum varð gjørd í samstarvi millum Útlendingastovuna og Fróðskaparsetur Føroya. Kanningin fevnir um spurningar um lívsgóðsku, sálarheilsu og nøgdsemi við føroysku vælferðartænasturnar.

## English

On February 24th, 2022, Russia invaded Ukraine, causing thousands to flee the country. The Faroe Islands decided to welcome Ukrainian refugees, providing them access to education, the labour market, and healthcare services. This report describes the health status and daily life of Ukrainian refugees in the Faroe Islands and their assessment of the services they have received. The report is based on a survey conducted in collaboration between the Faroese Immigration Office and the University of the Faroe Islands. The survey includes questions about quality of life, mental health, and satisfaction with Faroese welfare services.

## Українська

24 лютого 2022 року Росія вторглася в Україну, що змусило тисячі людей залишити країну. Фарерські острови вирішили прийняти українських біженців, надавши їм доступ до освіти, ринку праці та медичних послуг. Цей звіт описує стан здоров'я та повсякденне життя українських біженців на Фарерських островах та їхню оцінку отриманих послуг. Звіт базується на опитуванні, проведеному у співпраці між Фарерським імміграційним офісом та Університетом Фарерських островів. Опитування включає питання про якість життя, психічне здоров'я та задоволеність фарерськими соціальними послугами.

# Inngangur

Tá Russland tann 24. februar í 2022 gjørdi innrás í Ukraina, hevði tað við sær, at fólk í túsundatali flýggjaðu úr landinum. Stutt eftir innrásina boðaði Føroya Landsstýri frá, at Føroyar ynsktu at taka ímóti ukrainskum flóttafólki, og at serlógin fyri burturriknar ukrainar, sum gav ukrainum uppihaldsloyvi í Danmark, eisini skuldi verða løgd fyri Løgtingið og verða sett í gildi í Føroyum. Avgerð varð samstundis tikin um, at ukrainsku flóttafólkini sum skjótast skuldu fáa møguleika til at liva eitt so vanligt lív í Føroyum sum til bar. Flóttafólkini skuldu javnsetast við føroyingar á flestu økjum, sum m.a. merkti, at tey skuldu fáa atgongd til skúlaverkið og arbeiðsmarknaðin, rættindi til tænastur og veitingar sambært almannalóggávuni hjá Almannaverkinum og rættindi til sjúkuviðgerð í Heilsuverkinum[1].

Tá Føroyar ikki høvdu tikið ímóti flóttafólkum áður, fór eitt stórt tvørgeiraligt og -fakligt samstarv í gongd at fyrireika lógarverk og móttøku. Ein sokallað "task force" eind varð sett á stovn fyri at gera mannagongdir og at finna praktiskar loysnir til áðrenn, undir og eftir tað, sum verður kallað "asylfasan"[2]. Vinnumálaráðið, sum tá hevði útlendinga- og integratiónsmál sum málsøki, hevði ábyrgd av samskipanareindini. Dømir um praktiskar loysnir, sum skuldu finnast, eru móttøkuhús, umsókn um uppihaldsloyvi, bústað, innbúgv, fíggjarligar veitingar, p-tal, stovna bankakonto, skúla- og dagstovnatilboð, arbeiði og heimavitjan frá heilsufrøðingi[3].

Útlendingastovan fekk samskipanarleiklutin av móttøku og høvuðsábyrgd av asylfasuni í Føroyum vegna Udlændingestyrelsen. Í asylfasuni hava flóttar rætt til m.a. innivist, mat, klæðir, peningaligar veitingar, heilsukanning hjá lækna og heilsufrøðingi og samrøðu við sálarfrøðing. Heilsukanningar vóru eitt tilboð og ikki eitt krav. Í asylfasuni stóð Reyði Krossur Føroya, vegna Útlendingastovuna, fyri móttøkuhúsi (íroknað flutning, innivist, mat, klæðir). Útlendingastovan stóð fyri vegleiðing um umsókn til uppihaldsloyvi, samrøðu og peningaligum veitingum. Eitt toymi undir Heilsumálaráðnum, sum Pál Weihe, adjungeraður professari í fólkaheilsu, var á odda fyri, skipaði heilsukanningarnar.

---

1. Uppskot til ríkislógartilmæli, 5. apríl 2022, nr. 412

2. Í hesum føri er asylfasan tíðarskeiðið frá tí, ein flótti kemur til landið og søkir um uppihaldsloyvi til og við fjórða dagin eftir, at loyvið er givið, og Føroya Landsstýri yvirtekur ábyrgdina av flóttafólkinum. Í sjálvari asylfasuni hoyra flóttafólkini til danska myndugleikan Udlændingestyrelsen, tí sjálvt asyløkið er danskt málsøki.

3. Aðrir aktørar vóru m.a. Almenna- og mentamálaráðið, Heilsumálaráðið, Føroya Politi, Almannaverkið, Undirvísingarstýrið, Heilsutrygd, Gigni, Kommunufelagið, Barnaverndarstovan, Tórshavnar kommuna, Reyði Krossur Føroya og Útlendingastovan.

## Fyribyrgjandi tiltøk í Føroyum

Tá fólk flýggja úr heimlandinum vegna kríggj, broytist tilvera teirra frá degi til dags. Tey rýma frá húsi og heimi, arbeiði, skúla, mentan og máli, familju, vinum og kenningum. At flýggja førir við sær strongd, sum í longdini kann hava neiliga ávirkan á kropsliga og sálarliga heilsu, og, uttan røttu hjálp og viðgerð, kunnu summi eisini fáa álvarsligari mein sum trauma og posttraumatiska belastningsreaktión (PTSD) (Bogic et al., 2015; Li et al., 2016). At byrja av nýggjum í fremmandum landi kann eisini vera trupult. Viðurskifti sum t.d. manglandi málførleikar, arbeiðsloysi, vánalig fíggjarstøða, vánaligir bústaðarmøguleikar, heimlongsul, einsemi og mismunur kunnu elva til, at flóttafólk fáa heilsutrupulleikar (Li et al., 2016). Fyri at fyribyrgja, at flóttafólk ikki verða ov strongd og fáa varandi mein, er tað sostatt týdningarmikið, at móttakandi landið skjótt veitur teimum munagóð psykososial tilboð, heilsutænastur, fíggjarligar veitingar, bústað og trygd (NKVTS, 2022).

Í Føroyum eru ymisk tiltøk sett í verk fyri at fyribyrgja mistrivnað millum ukrainar. Almannaverkið og Tórshavnar Kvøldskúli (seinni Undirvísingarstýrið) hava staðið fyri ávikavíst at fáa arbeiðsleysu flóttafólkini virkin á arbeiðsmarknaðinum og skipað undirvísing í føroyskum sum annaðmál. Reyði Krossur Føroya hevur sett í verk Reyða Kross Vinir, eitt sosialt tilboð, har ein sjálvboðin verður settur saman við ein ukraina at hjálpa við praktiskum spurningum og vera saman sosialt. Útlendingastovan hevur m.a. skipað fyri hugnakvøldi hvørt hóskvøld og hevur tosað við allar ukrainar við komu um, hvussu teir hava tað, veitt psykososialt tilfar um vanligar reaktiónir hjá børnum og vaksnum undir kreppum og vegleitt í, hvussu teir koma í samband við kommunulækna og sálarfrøðing[4].

Í januar 2024 fór felagsskapurin Berin undir eina royndarverkætlan at veita ukrainum ókeypis sálarliga viðgerð og bólkasamrøður til ukrainar eftir tilmæli frá Útlendingastovuni. Hetta stigið varð tikið m.a. tí, at tað var ov trupult hjá ukrainum at koma í samband við almennu skipanina uttan tulk og at vita, hvønn sálarfrøðing teir kunnu venda sær til, tá øll kunning er á føroyskum. Eisini hevur tað týdning at menna eitt serligt tilboð og vitan innan sálarliga hjálp til flóttar, tá einki slíkt tilboð er frammanundan. Sostatt kunnu ukrainar í øllum aldri nú venda sær til eitt stað, sum so við og við uppbyggir sær royndir at veita flóttum sálarliga hjálp. Royndarverkætlanin fór í gongd um somu tíð sum arbeiðið til hesa kanning varð gjørt.

4. Ukrainar, sum føroyingar, kunnu fáa ávísing til tíggju viðgerðir hjá sálarfrøðingi og søkja um at fáa eginpeningin, sum ikki er rindaður av Heilsutrygd, rindaðan av Almannaverkinum eftir lóg um almannatrygd og tænastur.

Útlendingastovan veit frá samrøðum við ukrainar, at tað er ymiskt, hvørjar upplivingar teir hava havt av krígnum og merkist tað, at teir, sum hava verið longri í Ukraina, eru verri fyri sálarliga. Kvinnur eru farnar frá manni, soni ella pápa og flestu flóttafólkini hava til felags, at tey hava mist onkran kæran, hava upplivað álop á bý teirra og verið í bumbuskýli. Summi eru flýdd fyri lívinum og hava upplivað ræðuleikar á egnan kropp, sum eru truplir at seta orð á. Útlendingastovan er eisini vitandi um, at fleiri ukrainar stríðast sálarliga av hesum. Hóast teir eru flýggjaðir undan krígnum, so steðga ræðuleikarnir ikki. Harafturímóti halda teir áfram at missa avvarðandi, eins og hús og heim verða bumbað. Við hesum í huga kann tað vera trupult at savna seg um at skapa eitt nýtt og gott lív í Føroyum.

Fyribils úrslit frá kanning um ukrainskar flóttar í Danmark vísir m.a., at hóast flestu av teimum spurdu siga seg hava tað gott í Danmark, hava uml. tveir triðingar av teimum spurdu tekin um PTSD (Karstoft et al., 2024). Tey spurdu uppliva eisini í størri mun enn onnur, at tey hava avbjóðingar í gerandisdegnum í sambandi við atgongd til heilsuviðgerð, við familju- og heimlívi og við einsemi (Karstoft et al., 2024). Tá Føroyar og Danmark sum samfeløg eru sera lík, tá ið hugsað verður um mentan, vælferðartænastur og skipanir, so kann tað hugsast, at støðan hjá ukrainum í Føroyum er lík tí donsku. Tí varð tað mett neyðugt at fáa betri innlit í støðuna hjá ukrainum í Føroyum.

# Endamál við kanningini

Eftirsum hetta er fyrstu ferð, at almennu Føroyar hava tikið ímóti flóttafólkum í Føroyum, varð mett, at tað var neyðugt at fáa innlit í, hvussu ukrainar hava tað her, hvat teir halda um tær tænastur og tilboð, sum teir hava fingið, og um tað kanska eru onnur viðurskifti, sum teir meta kundu verið betur. Eisini varð mett, at niðurstøður frá tílíkari kanning kunnu geva myndugleikum ábendingar um, hvørt arbeiðið at taka ímóti flóttum er á nøktandi støði og kunnu vera ein hjálp í sambandi við raðfesting av arbeiðsuppgávum. Tí varð hendan kanning sett í verk. Kanningin varð gjørd í samstarvi millum Útlendingastovuna og Anniku Helgadóttir Davidsen (framyvir nevnd AHD), adjunkt í sálarfrøði á Fróðskaparsetri Føroya.

# Háttalag

Útlendingastovan sendi á vári 2024 spurnablað til teir ukrainar, sum vóru flýddir til Føroya undan innrásini, ið byrjaði 22. februar 2024. Ukrainarnir fingu møguleika at hoyra um kanningina til eitt hugnakvøld í desember 2023 og síðani varð kunning send við telduposti til teirra í februar 2024. Kanningin skal síggjast sum ein løtumynd av heilsustøðu og gerandisdegi hjá teimum ukrainum, sum búðu í Føroyum hetta tíðarskeiðið og valdu at svara kanningini. Síðani kanningin varð gjørd, eru fleiri teirra farin av landinum aftur, meðan onnur eru komin til, sum møguliga hava eina aðra uppliving og meining um viðurskiftini í Føroyum.

Spurnablað varð sent til 115 ukrainar eldri enn 18 ár, sum komu til landið í tíðarskeiðinum mars 2022 til februar 2024. Spurnablaðið varð skrivað á ukrainskum, og luttakarar kundu svara á ukrainskum. Spurningarnir í spurnablaðnum snúðu seg um hjúna- og familjustøðu, útbúgvingarstøði, ferðina til Føroya, lívsgóðsku (WHOQOL-BREF) (WHO, 2004), broytingar í sálarheilsu og gerandislívi hjá teimum sjálvum (m.a. spurningar um tunglyndis- og angisteyðkenni) og møguligum børnum, umframt nøgdsemi við føroysku vælferðartænasturnar. Luttakararnir fingu eisini høvi at svara fýra opnum spurningum um lív teirra í Føroyum.

Luttakarar vórðu kunnaðir um frammanundan, at teir vóru dulnevndir í kanningini. Bara AHD hevði atgongd til dáturnar, áðrenn tær vórðu uppgjørdar. Alt samskifti við luttakarar fór fram á ukrainskum, og talgildi spurnablaðs-pallurin SurveyXact varð nýttur til at innsavna svarini við (Rambøll, 2024), ið síðani vórðu gjørd upp.

# Úrslit

## Luttakarar

Av teimum 115 ukrainunum, ið fingu spurnablaðið sendandi, svaraðu 113 teirra antin øllum ella einum parti av spurningunum. Svarluttøkan var sostatt 98,3%. Kynsbýtið av luttakarum var 88% kvinnur og 12% menn. Luttakararnir vóru í aldrinum 18-71 ár, og miðalaldurin var 43,1 ár. 36% av luttakarunum vóru stakir meðan 33% av luttakarunum giftir. 64% av luttakarunum høvdu ikki børn yngri enn 18 ár. Av teimum, sum høvdu børn, búðu børnini hjá 88% av teimum í Føroyum (sí  talvu 1).

### Talva 1. Yvirlit yvir luttakararnar

| Luttakarar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Gentur/kvinnur | 100 | 88 |
| Dreingir/menn | 13 | 12 |
| Miðalaldur | 43,1 | - |
| Støk/stakur | 41 | 36 |
| Gift/ur | 37 | 33 |
| Børn yngri enn 18 ár: Nei | 66 | 64 |
| Børn eldri enn 18 ár: Nei | 59 | 61 |
| Hægsta útbúgving: Bachelor | 50 | 57 |
| Arbeiðsstøða: Í fulltíðarstarvi | 26 | 29 |
| Arbeiðsstøða: Í parttíðarstarvi | 14 | 16 |
| Arbeiðsstøða: Arbeiðsleys/ur | 25 | 28 |

Av luttakarunum vóru 39 í aldrinum 18-25 ár, og av teimum søgdu 49%, at teir komu einsamallir til Føroya, meðan restin av teimum komu til Føroya við familju ella vinum. 57% av luttakarunum høvdu eina bachelor sum hægstu útbúgving. 29% vóru í fulltíðarstarvi í Føroyum, meðan 28% vóru arbeiðsleys. 74% av luttakarunum søgdu seg vera ávirkaðar av russisku innrásini, sum var í eystara partinum av Ukraina í 2014, og 16% søgdu seg vera noydd at flyta til ein annan part í Ukraina vegna innrásina í 2014. 64% av luttakarunum búðu í syðra partinum av Ukraina (Zaporizjzja, Dnipro, Kherson, Odessa, Mykolajiv ella Krim), tá kríggið brast á 24. februar 2022.

## Lívsgóðska

Luttakararnir vórðu spurdir um lívsgóðsku við føroysku útgávuni av spurnablaðnum WHOQOL-BREF, sum er eitt spurnablað, ið mátar lívsgóðsku á fýra ymiskum økjum: 1. kropslig heilsa, 2. sálarlig heilsa, 3. sosial sambond og 4. umhvørvisheilsa (t.d. um fysiska nærumhvørvið er tungt og/ella ótrygt) (Skevington et al., 2004; WHO, 2004). Tá tølini verða roknaði saman, verður eitt miðaltal fyri hvørt øki roknað, ið gongur frá 4-20. Lægra talið boðar frá lágari lívsgóðsku, og hægra talið frá høgari lívsgóðsku innan hvørt øki.

Yvirskipað søgdu 65% av luttakarunum seg hava eina høga lívsgóðsku, meðan 20% søgdu seg hava eina miðal høga lívsgóðsku. 41% av luttakarunum søgdu seg vera nøgd við heilsuna, meðan 28% vóru hvørki nøgd ella ónøgd. 26% vóru ónøgdir við heilsustøðuna. Úrslitini í talvu 2 og 3 niðanfyri vísa harumframt, at luttakararnir hava eina lívsgóðsku, sum viðvíkjandi kropsligari og sálarligari heilsu liggur um miðal, og viðvíkjandi sosialum sambondum og umhvørvisheilsu liggur beint yvir miðal.

### Talva 2. Yvirskipað lívsgóðska og nøgdsemi við heilsuna, býtt upp á aldur

| Lívsgóðska og nøgdsemi við heilsuna | Allir aldursbólkar | 18-24 ár | 25-34 ár | 35-44 ár | 45-54 ár | 55-64 ár | 65-71 ár |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av luttakarum | 74 | 14 | 5 | 25 | 16 | 10 | 4 |
| Luttakarar við høgari ella sera høgari lívsgóðsku | 74% | 35,5% | 33,3% | 64,9% | 23,1% | 33,3% | 66,7% |
| Luttakarar, ið vóru nøgd/ir ella sera væl nøgdir við heilsuna | 41% | 35,5% | 22,2% | 24,3% | 23,1% | 38,9% | 83,3% |

**Talva 3. Lívsgóðska í økjum, býtt upp á aldur**

| Lívsgóðska í 4 økjum | Allir aldursbólkar | 18-24 ár | 25-34 ár | 35-44 ár | 45-54 ár | 55-64 ár | 65-71 ár |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av luttakarum | 74 | 14 | 5 | 25 | 16 | 10 | 4 |
| Kropslig heilsa | 11,7 | 11,9 | 13,0 | 11,3 | 12,3 | 10,5 | 11,7 |
| Sálarlig heilsa | 12,5 | 11,6 | 13,1 | 12,0 | 13,6 | 12,7 | 13,3 |
| Sosial sambond | 13,1 | 12,8 | 12,8 | 12,3 | 14,1 | 13,6 | 14,7 |
| Umhvørvisheilsa | 13,0 | 12,5 | 12,5 | 12,2 | 14,2 | 13,1 | 13,9 |

**WHOQOL-BREF miðaltalið liggur ímillum 4-20. Eitt tal nærri við 4 boðar frá lágari lívsgóðsku, og eitt tal nærri við 20 boðar frá høgari lívsgóðsku.*

## Broytingar í sálarheilsu og gerandislívi hjá luttakarunum

Niðanfyri vísir talva 4 tey mest vanligu eyðkennini fyri tunglyndi (spurningar 1-9) og angist (spurningar 10-16). Talvan vísir, at flestu luttakarar uppliva eina broyting í bæði sálarheilsu og gerandislívi samanborið við, hvussu teir høvdu tað áðrenn kríggið.

Luttakararnir tykjast at vera ávirkaðir av bæði tunglyndis- og angisteyðkennum. Størsta broytingin innan tunglyndiseyðkennini sæst í 6 teimum fyrstu spurningunum, sum snúgva seg um at vera hugtung/ur, tunglynt/ur ella vónleys/ur, svøvn, orku og matarlyst. Tá ið tað snýr seg um angist, er ein stórur partur av luttakarunum merktur av stúran, ótta og fjáltri (nervøsitet).

Tað er ikki stórur munur á aldursbólkunum hesum viðvíkjandi. Tó, so eru ábendingar um, at serliga luttakarar í yngra aldursbólkinum eru merktir av svøvntrupulleikum, møði og tonkum um sjálvskaða og sjálvmorð, ið oftari koma fyri nú enn áðrenn kríggið. Luttakarar í øllum aldursbólkum siga seg vera merktar av at vera meira hugtungir, tunglyntir og vónleysir síðani kríggið byrjaði.

**Talva 4. Broytingar í sálarheilsu og gerandislívi hjá luttakarum, síðani kríggið byrjaði**

| Broytingar í sálarheilsu og gerandisdegi | Óbroytt (%) | Lítil broyting ella eitt sindur av broyting í (%) | Kemur oftari ella nógv oftari fyri (%) |
|---|---|---|---|
| 1. Lítil áhugi ella gleði í at gera ting | 26 | 65 | 9 |
| 2. Hugtung/ur, tunglynt/ur ella vónleysur | 24 | 53 | 23 |
| 3. Trupulleikar við at sovna ella sova | 22 | 47 | 31 |
| 4. Møði ella vantandi orkuorka | 21 | 56 | 24 |
| 5. Vantandi matarlystur ella ovát | 37 | 52 | 11 |
| 6. Hevur tað keðiligt við sær sjálvum | 59 | 30 | 12 |
| 7. Trupult við at hugsavna seg | 51 | 40 | 8 |
| 8. Flytur seg ella tosar seint, ella vera rastleys/ur | 71 | 28 | 1 |
| 9. Tankar um, at tað var betri at skaða seg sjálva/n, ella um mann var deyð/ur | 82 | 15 | 3 |
| 10. Kennir seg nervøsa/n | 19 | 52 | 30 |
| 11. Trupult við at stýra stúranum | 41 | 43 | 16 |
| 12. Ov nógvar stúranir | 26 | 52 | 22 |
| 13. Trupult at slappa av | 35 | 41 | 23 |
| 14. Vera so rastleys/ur, at tað er trupult at sita still/ur | 50 | 43 | 7 |
| 15. Verða lættari irriterað/ur | 35 | 49 | 16 |
| 16. Vera bangin fyri, at okkurt ræðuligt fer at henda | 25 | 46 | 30 |

## Broytingar í sálarheilsu og gerandislívi hjá børnunum hjá luttakarunum

Luttakararnir vórðu m.a. spurdir um broytingar í sálarheilsu og gerandislívi hjá børnunum, síðani kríggið byrjaði. Um tey høvdu fleiri børn, svaraðu tey fyri hvørt barnið sær. Spurningarnir vórðu umsettir úr The Pediatric Symptom Check-List (vanliga nevndur PSC-17) (Gardner et al., 2007), sum gjøgnum 17 spurningar býtir eyðkenni í 3 undirbólkar: internaliserandi trupulleikar (t.d. at vera keddur), eksternaliserandi trupulleikar (t.d. at arga onnur) og uppmerksemistrupulleikar (órógvan). Talva 5 vísir býtið av svarum fyri hvørt barnið.

### Talva 5. Broytingar í sálarheilsu og gerandislívi hjá børnum luttakaranna, síðani kríggið byrjaði

| Broytingar í sálarheilsu og gerandisdegi hjá børnunum | Barn 1 (31 svar) | | | Barn 2 (17 svar) | | | Barn 3 (8 svar) | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Minni % | Sama % | Oftari % | Minni % | Sama % | Oftari % | Minni % | Sama % | Oftari % |
| 1. Óróligt, fær ikki sitið í frið | 32 | 58 | 10 | 52 | 48 | 0 | 50 | 50 | 0 |
| 2. Kennir seg kett, ólukkuligt | 35 | 52 | 13 | 33 | 57 | 10 | 38 | 50 | 13 |
| 3. Dagdroymir ov nógv | 32 | 55 | 13 | 24 | 59 | 18 | 63 | 25 | 13 |
| 4. Vil ikki deila | 37 | 57 | 7 | 24 | 65 | 12 | 50 | 50 | 0 |
| 5. Skilir ikki kenslurnar hjá øðrum | 42 | 52 | 6 | 25 | 56 | 19 | 71 | 29 | 0 |
| 6. Kennir seg vónleyst | 42 | 55 | 3 | 27 | 60 | 13 | 57 | 43 | 0 |
| 7. Trupult at hugsavna seg | 39 | 55 | 6 | 38 | 56 | 6 | 71 | 29 | 0 |
| 8. Klandrast við onnur børn | 55 | 42 | 3 | 50 | 50 | 0 | 86 | 14 | 0 |
| 9. Hevur tað keðiligt við sær sjálvum | 32 | 61 | 6 | 25 | 63 | 13 | 43 | 57 | 0 |
| 10. Skyldar upp á onnur | 39 | 52 | 10 | 44 | 50 | 6 | 83 | 17 | 0 |
| 11. Hevur tað minni stuttligt | 43 | 40 | 17 | 44 | 38 | 19 | 67 | 33 | 0 |
| 12. Gevur sær ikki far um reglur | 43 | 47 | 10 | 38 | 56 | 6 | 67 | 33 | 0 |
| 13. Uppførir seg, sum tað er drivið av motori | 45 | 48 | 6 | 38 | 63 | 0 | 67 | 33 | 0 |
| 14. Argar onnur | 45 | 52 | 3 | 53 | 40 | 7 | 83 | 17 | 0 |
| 15. Stúrir nógv | 37 | 53 | 10 | 29 | 43 | 29 | 67 | 17 | 17 |
| 16. Tekur ting, sum tað ikki eigur | 52 | 48 | 0 | 53 | 47 | 0 | 83 | 17 | 17 |
| 17. Órógvast lættliga | 26 | 68 | 6 | 53 | 40 | 7 | 67 | 33 | 33 |

Um hugt verður at svarunum hjá foreldrunum, so sæst, at tað, ið tykist vera mest neiliga ávirkað hjá barni nr. 1, er eginleikin hjá barninum at hava tað stuttligt, at vera kedd/ur ella ólukkulig/ur og at dagdroyma ov nógv. Hjá barni nr. 2 er tað sama mynstur, umframt stúranir, vónloysi og ikki at skilja kenslurnar hjá øðrum. Hjá barni nr. 3 er tað mest at vera lættliga órógvað, umframt stúranir og at taka ting hjá øðrum, ið hendir oftari nú enn fyri kríggið.

## Vælferðartænastur

Luttakararnir vórðu til endans spurdir um, hvussu nøgdir teir vóru við tær tænastur, teir høvdu fingið í Føroyum. Bert 47 av 113 luttakarum svaraðu hesum parti av kanningini. Tað er torført at vita, hví so er, men ein frágreiðing kann vera, at hesin parturin í spurnablaðnum kom aftaná partin, sum snúði seg um børn. Tá ið 64% av luttakarum ikki hava børn undir 18 ár, hava teir kanska hildið, at restin av kanningini ikki er viðkomandi fyri teir. Tað er eisini møguligt, at luttakararnir vórðu møddir av at svara so nógvum spurningum og góvust.

Sum talva 6 niðanfyri vísir, so vóru allarflestu luttakararnir nøgdir við tær vælferðartænastur, teir høvdu fingið. Serliga nøgdir vóru teir við stuðulin til integratión, kunningina um føroyska samfelagið og fíggjarliga stuðulin. Talvan vísir eisini, at luttakararnir vóru mest ónøgdir við heilsutænasturnar, eins og ein rættiliga stórur partur segði seg vera hvørki samdan ella ósamdan við útsagnirnar.

### Talva 6. Nøgdsemi við vælferðartænastur

| Vælferðartænastur (47 svar) | Sera ósamd/ur ella ósamd/ur (%) | Hvørki samd/ur ella ósamd/ur (%) | Samd/ur ella sera samd/ur (%) | Veit ikki (%) |
|---|---|---|---|---|
| 1. Eg eri nøgd/ur við fíggjarliga stuðlin, eg fái | 7 | 21 | 70 | 2 |
| 2. Eg eri nøgd/ur við heilsutænasturnar | 21 | 34 | 29 | 15 |
| 3. Eg eri nøgd/ur við atgongdina til sálarfrøðiliga hjálp | 9 | 23 | 66 | 6 |
| 4. Eg eri nøgd/ur við møguleikarnar at læra føroyskt | 10 | 28 | 51 | 11 |
| 5. Eg eri nøgd/ur við stuðulin, eg fái at finna arbeiði | 6 | 23 | 58 | 13 |
| 6. Eg eri nøgd/ur við kunningina, eg fái um føroyska samfelagið og mentanina | 6 | 15 | 76 | 3 |
| 7. Eg eri nøgd/ur við stuðulin, eg fái fyri at gerast partur av føroyska samfelagnum | 2 | 13 | 85 | 0 |

**Samandráttur av svarum upp á opnu spurningarnar**

Í síðsta partinum av spurnablaðnum fingu luttakarar møguleika fyri við egnum orðum at svara hesum fýra spurningum: "*Tá ið tú hugsar um tína støðu nú, hvat slag av stuðuli hevur tú og/ella familja tín tørv á, sum tit ikki fáa*?; "*Hvat ert tú mest nøgd/ur við viðvíkjandi lívinum í Føroyum*?"; "*Hvat ert tú mest ónøgd/ur við viðvíkjandi lívinum í Føroyum*?" og "*Hvat hevði gjørt teg nøgdari við lívið í Føroyum*?".

Yvirskipað svaraðu luttakararnir, at teir eru væl nøgdir og fleiri siga seg hava alt tað, sum teimum tørvar. Teir eru sera takksamir fyri stuðulin, sum teir hava fingið frá bæði myndugleikum og privatpersónum í Føroyum. Teir eru glaðir fyri friðin, hjálpsemið og tryggleikan í Føroyum, vøkru náttúruna, og at føroyingar eru blíðir og fyrikomandi. Tó nevna luttakararnir eisini, at teimum tørvar betri stuðul í sambandi við lækna- og heilsutænastur, og at tað er trupult at koma í samband við heilsuverkið, umframt, at teimum tørvar ein tryggan bústað, arbeiði og hægri fíggjarligan stuðul, tí teir hava torført við at fáa endarnar at røkka saman og at rinda húsaleigu. Tað er torført at samskifta við onnur, tí flestu teirra duga hvørki enskt ella føroyskt. Fleiri luttakarar svara eisini, at teir eru ónøgdir við veðrið og við busssambandið í Føroyum, serliga í vikuskiftinum. Summir siga seg vera einsamallar og ynskja meira samband við føroyingar. Aðrir svara, at teir ikki hava tað gott, antin kropsliga ella sálarliga. Fleiri luttakarar nevna, at teir eru stúrnir um familju í Ukraina, og at teir ynskja at sleppa heim til frið. Fleiri ynskja eisini at fáa arbeiði, at læra føroyska málið og at brúka sína útbúgving fyri at gerast sjálvbjargin. Summir luttakarar nevna eisini, at teir ynskja at verða verandi í Føroyum.

# Samanumtøka og niðurstøður

Yvirskipað vísir kanningin, at tað ber til at taka ímóti flóttafólki í Føroyum og, at tað sum heild hevur eydnast at bjóða teimum hóskandi tænastur og tilboð, sum fáa tey at støðast í Føroyum. Teir luttakarar, sum svaraðu spurningum um vælferðartænastur, søgdu, at teir eru væl nøgdir og takksamir fyri hjálpina og blíðskapin, sum teir hava fingið her, hóast teir eru stúrnir um familju heima og ynskja at venda heim til frið í Ukraina. Kanningin vísir eisini, at teir og børnini hava eina góða lívsgóðsku, eina rímiliga sálarheilsu og ein virknan gerandisdag í Føroyum, serliga, tá ið hugsað verður um tað stríð, tey hava verið ígjøgnum, síðani kríggið brast á í heimlandinum. Summi teirra hava enntá upplivað avleiðingar av tveimum kríggjum innan stutta tíð, vísandi til innrásina av Krim, umframt Donetsk og Luhansk í 2014, og á tann hátt kann sigast, at úrslitini eru jalig, hóast vit ikki hava vitan um lívsgóðsku teirra í heimlandinum fyri kríggið. Úrslitini samsvara eisini við donsk úrslit (Karstoft et al., 2024).

Tó eru eyðkenni hjá bæði vaksnum og børnum teirra, ið týða á eina ávísa sálarliga byrðu. Tey flestu av teimum vaksnu siga seg hava upplivað broytingar í sálarheilsuni, sum serliga snýr seg um, at tey oftari eru merkt av tunglyndi- og angisteyðkennum. Hetta samsvarar við tað, sum aðrar útlendskar kanningar vísa á (Boiko et al., 2024; Buchcik et al., 2023; Lushchak et al., 2024). Svarini benda harumframt á, at tað serliga eru tey í yngra aldursbólkinum, ið eru merkt av átrokandi og álvarsamum sálarligum byrðum, so sum tonkum um sjálvskaða og sjálvmorð. Kanningin vísir eisini, at helmingurin av luttakarunum í aldrinum 18-25 ár, eru komin til Føroya einsamøll, sum merkir, at tey hava einki netverk her, sum kann stuðla teimum fíggjarliga og kensluliga. Gransking vísir á, at ungir flóttar eru serliga viðbreknir fyri neiligum avleiðingum av kríggi, og at teir ofta mangla munagóða atgongd til útbúgving, arbeiði og sálarligan stuðul í júst tí tíðarskeiðinum í lívinum, tá ið teir vanliga áttu at ment seg innan útbúgving og yrkisleið (Chudzicka-Czupala et al., 2025). Undir slíkum umstøðum kann tað hugsast, at framtíðin fyri ungar ukrainar sær døpur og meiningsleys út. Tað er tí umráðandi, at almennir stovnar og onnur, sum koma í samband við ukrainar, og serliga ungar ukrainar, geva avbjóðingum við sálarheilsu gætur og tryggja, at tey fáa røttu hjálp og stuðul til gerandisdagin, og at tey fáa møguleika at mennast. Harafturat er týðandi, at neyðug psykososial tilboð verða bjóðaði, umframt, at sálarlig og psykiatrisk viðgerð er tøk og heldur fram. Hetta er neyðugt fyri at fyribyrgja, at omanfyri nevndu eyðkenni ikki menna seg til álvarsom mein sum t.d. trauma, posttraumatiska belastningsreaktión ella, í ringasta føri, sjálvmorð.

Viðvíkjandi broytingum í sálarheilsuni og gerandislívinum hjá børnunum, so meta foreldrini, at børnini oftari uppliva serliga internaliserandi trupulleikar (barnið er

kett/ólukkuligt, hevur tað minni stuttligt, stúrir) og uppmerksemistrupulleikar (óró, dagdroyman). Hetta eru aftur eyðkenni, sum eru skillig, tá ið hugsað verður um tað, barnið hevur verið fyri. Samstundis eru hetta eyðkenni, ið eru umráðandi at fyribyrgja langtíðarárin av, m.a. tí, at internaliserandi trupulleikar í aðrari kanning av ukrainskum flóttabørnum vórðu settir í samband við PTSD (Lev-Ari et al., 2024). Hóast flóttabørn sambært summum kanningum vísa gott mótstøðuføri og kunnu klára seg væl, eru tey í einari serliga viðkvæmari støðu, um foreldur teirra eisini hava sálarligar trupulleikar (Dangmann et al., 2022; Lev-Ari et al., 2024; Ludvigsson & Loboda, 2022).

Útlendingastovan er vitandi um, at føroyskir dagstovnar og skúlar gera eitt stórt arbeiði fyri at integrera børnini og fyri at fáa tey at trívast og mennast. Hóast hetta eru nøkur børn, sum hava avbjóðingar við trivnaði og uppmøting, at læra málið og at gerast partur av einum skúlaflokki. Vit vita eisini, at tað hevur verið ein avbjóðing fyri skúlar, at summi børn framhaldandi fylgja undirvísing úr ukrainska grundskúlanum á netinum, samstundis sum tey ganga í skúla í Føroyum, sum óivað økir um trýstið á børnini. Líknandi avbjóðingar eru eisini lýstar í m.a. Danmark (Center for Udsatte Flygtninge, 2024). Tað er tískil týdningarmikið, at avvarðandi myndugleikar fylgja hesum avbjóðingum neyvt fyri at tryggja trivnað, framhaldandi menning og fyribyrgja strongd og mistrivnaði hjá børnunum og familjum teirra.

Tey, ið flýggja undan kríggi, hava ofta havt ógvusligar upplivingar við sær, og eru í størri mun enn onnur í vanda fyri at fáa sálarligar trupulleikar so sum angist, tunglyndi og onnur árin av kreppu og skelki (Bogic et al., 2015; Karstoft et al., 2024; Steel et al., 2009). Tað er umráðandi at taka hædd fyri hesum eyðkennum, bæði hjá teimum vaksnu, men eisini hjá børnum og ungum, sum flýggja saman við sínum foreldrum ella øðrum vaksnum.

Spurningurin um, hvussu russiska innrásin av Krim v.m. í 2014 hevur ávirkað luttakararnar, er viðkomandi, tí fólk, sum hava upplivað kríggj og eru flýggjað í fleiri umførum, kunnu uppliva, at gomul trauma koma aftur og at upplivingarnar av nýggjum trauma gerast uppaftur sterkari (NKVTS, 2022). Tað er eisini áhugavert, at heili 74% siga seg vera ávirkaði av innrásini í 2014, hóast einans 16% búðu í hersettu økjunum. Kríggið í hersettu økjunum Donetsk og Luhansk hevur hildið fram síðani 2014. Hóttanin og regluligu álopini við markið til Russlands kann hava havt eina neiliga ávirkan á gerandisdagin og trygdarkensluna hjá teimum spurdu.

Hóast kanningin bendir á, at ukrainar sum heild eru nøgdir við tær tænastur, sum teir hava fingið, er tað ymiskt, sum teir eru minni nøgdir við. Serliga eru tað heilsutænastur, sum fólk eru ónøgd við. Útlendingastovan er vitandi um, at fleiri ikki hava

fingið kommunulækna, og at tað hevur verið trupult hjá ukrainum sum heild at fingið fatur á lækna og at fara til viðtalur, tí so at siga øll kunning og samskifti er á føroyskum. Starvsfólk á Útlendingastovuni hava tískil hjálpt ukrainum at biðja um tíð hjá lækna, eisini uttanfyri arbeiðstíð og í vikuskiftum. Í hesum samanhangi skal nevnast, at tað eru munir millum mentan, skipanir (alment mótvegis privat), atgongd til og brúk av t.d. serlækna og heilivági í Føroyum og Ukraina. Fyri ukrainar kann tað tískil tykjast møtimikið at fáa læknahjálp í Føroyum, tí tey skilja ikki málið og kanska ikki skilja, hvussu okkara skipan virkar. Tað er týdningarmikið, at atgongd til og kunning um føroyska heilsuverkið verður betrað, so, at ukrainar sjálvstøðugt kunnu venda sær til lækna og fáa fatur á læknahjálp, tá ið tað er neyðugt.

Gransking vísir, at tað er avgerandi fyri flóttar, at vera virknir í arbeiði ella skúla, fyri at fyribyrgja einsemi og strongd, umframt, at tað er ein týdningarmikil partur av at verða integreraður (Li et al., 2016). Í hesi kanning svaraðu 26% av teimum spurdu, at tey arbeiða fulla tíð, 16% svaraðu, at tey arbeiða parttíð, meðan 25% svaraðu, at tey eru arbeiðsleys. Tilsamans 20% vóru ikki á arbeiðsmarknaðinum, tí tey antin eru pensjóneraði ella hava serligan tørv, og 6% vóru lesandi. Tað kann ljóða nógv, at heili 25% av teimum spurdu eru arbeiðsleys, tá ið arbeiðsloysið í Føroyum annars hevur ligið um 1% í fleiri ár (Hagstova Føroya, 2025). Mett verður tó, at summi eru óarbeiðsfør vegna sálarligar og kropsligar avleiðingar av krígnum. Hyggja vit eftir tølum um arbeiðsloysi millum ukrainar í t.d. Danmark, eru um 58% av teimum, sum eru mett at vera arbeiðsfør, í starvi (KL et al., 2023: 29) meðan í Noreg eru umleið 30% av ukrainum í aldrinum 20-66 ár í arbeiði (Hernes et al., 2024: 94). Talið úr Føroyum viðvíkjandi luttøku á arbeiðsmarknaðinum á tilsamans 42% tykist tískil at vera á góðari leið, vísandi til tíðarskeiðið, tá ið kanningin varð gjørd.

Tó vísa summir ukrainar í skrivligu svarunum á, at teir ynskja at koma í arbeiði, at læra føroyska málið og at fáa vinfólk. Tað er umráðandi, at hesi fólk fáa rætta stuðulin at koma út á arbeiðsmarknaðin, serliga meðan tey framvegis hava motivatión og mót uppá tað og fyri at fyribyrgja lagtíðararbeiðsloysi. Starvsfólk hjá Almannaverkinum hava skipað fyri starvsvenjingum á arbeiðsplássum í ein mánað í senn, og vita vit, at summir ukrainar hava fingið arbeiði tann vegin. Vit vita tó, at arbeiðið við at aktivera arbeiðsleysar ukrainar, hevur verið avbjóðandi m.a. tí, at Almannaverkið vantar heimildir til at skipa arbeiðið. Ukrainar er t.d. ikki fevndir av lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum er grundarlagið undir stuðulsskipanum til arbeiðsleys í Almannaverkinum. Skipanin hjá Almannaverkinum er við øðrum orðum ikki ætlað flóttafólki, og hetta merkist í praksis. Harafturat er tað ein avbjóðing, at flestu ukrainar ikki duga enskt ella føroyskt. Tað er týdningarmikið, at tað framhaldandi verður arbeitt við at gera eina serliga skipan til flóttafólk, sum stuðlar uppundir, at

ukrainar læra føroyska málið, koma í arbeiði og soleiðis gerast sjálvbjargnir, meðan teir eru staddir í Føroyum.

Summir ukrainar vísa í skrivligu svarunum á, at teimum tørvar ein fastan bústað og at tað er trupult at fáa endarnar at røkka saman. Hetta er Útlendingastovan vitandi um frá arbeiðinum at tryggja ukrainum fyrsta bústaðin eftir komu. Eingir almennir bústaðir eru at vísa flóttafólki til, og tað er sum heild bústaðartrot í Føroyum. Starvsfólk á Útlendingastovuni hava lagt til merkis, at leigukostnaðurin av vanligum íbúðum er nógv vaksin seinastu tvey árini. Samstundis fáa summir ukrainar, ið fáa uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi, sera lága veiting, og hava teir tískil ikki ráð at rinda fyri tær íbúðir, sum Útlendingastovan hevur havt møguleika at vísa til. Hetta hevur gjørt tað støðugt truplari at finna ukrainum varandi bústað, sum hevur ført við sær, at fleiri ukrainar búgva til stuttíðarleigu í íbúðum, sum verða leigaðar út til ferðafólk um summarið. Av tí sama mugu tey javnan flyta bústað, og hetta elvir til strongd og ótryggleika. Tað er tó ikki bara í Føroyum, at tað er ein avbjóðing at finna hóskandi og varandi bústaðir til flóttar úr Ukraina (sí t.d. KL et al. 2023; UNHCR, 2023), og tað er heldur ikki óvanligt, tá ið kríggj brestur á og stór mannfjøld flytur seg um landamørk. Hetta skal tó ikki vera ein undanførsla og eigur arbeiðið at tryggja ukrainum hóskandi og varandi bústaðir í Føroyum at halda fram, so teir hava virðilig kor.

At enda kann sigast, at hóast kanningin er avmarkað í vavi og bert er ein løtumynd, so gevur hon okkum innlit í støðuna hjá ukrainskum flóttum í Føroyum. Kanningin gevur okkum nakrar ábendingar um, at hóast ukrainar kenna seg væl tiknar ímóti, og teir sum heild eru nøgdir við vælferðartænasturnar, teir hava fingið, so eru tað enn økir, sum framhaldandi eiga at verða ment m.a. innan heilsu, arbeiði, mál, fíggjarliga veiting og bústaðir fyri at tryggja góða integratión, heilsu og trivnað millum ukrainar í Føroyum.

# Keldur

**Bogic, M., Njoku, A., & Priebe, S. (2015).**
Long-term mental health of war-refugees: a systematic literature review.
*BMC international health and human rights*, *15*, 1-41.

**Boiko, D. I., Shyrai, P. O., Mats, O. V., Karpik, Z. I., Rahman, M. H., Khan, A. A., Alanazi, A. M., & Skrypnikov, A. M. (2024).**
Mental health and sleep disturbances among Ukrainian refugees in the context of Russian-Ukrainian war: A preliminary result from online-survey. *Sleep Medicine*, *113*, 342-348.

**Buchcik, J., Kovach, V., & Adedeji, A. (2023).**
Mental health outcomes and quality of life of Ukrainian refugees in Germany.
*Health and Quality of Life Outcomes*, *21*(1), 23.

**Center for Udsatte Flygtningehjælp (2024).**
*Ukrainske børn, unge og forældre i folkeskolen – erfaringer og behov to år efter den store ankomst.*
DRC Dansk Flygtningehjælp.

**Chudzicka-Czupala, A, Hao, F, Hapon, N, Dubniak, Z, Rozycka, Weronika, Ostafinska-Molik, Ho, R. (2025).**
Well-being of Ukrainian and Polish college students during the Russo-Ukrainian war and coping strategies as predictors of mental health disorders. *Critical Public Health 35*(1) 2460996.

**Dangmann, C., Dybdahl, R., & Solberg, Ø. (2022).**
Mental health in refugee children. *Current Opinion in Psychology*, *48*, 101460.

**Gardner, W., Lucas, A., Kolko, D. J., & Campo, J. V. (2007).**
Comparison of the PSC-17 and alternative mental health screens in an at-risk primary care sample.
*Journal of the American Academy of Child & Adolescent Psychiatry*, *46*(5), 611-618.

**Hagstova Føroya. (2025).**
*Arbeiðsloysið var eitt prosent í januar*. Tikið niður 03-03-2025 frá
https://hagstova.fo/fo/tidindi/arbeidsloysid-var-eitt-prosent-i-januar.

**Hernes, V., Aasland, A., Deineko, O., Myhre, M. H., Myrvold, T. (2025).**
*Settlement, integration and employment under a temporary perspective: Ecperiences and persceptions of Ukrainian refugees and municipal refugee services (2023-2024).*
NIBR Report 2024: 10. Norgwegian Institute for Urban and Regional Research.

**Karstoft, K. I., Korchakova, N., Pedersen, A. A., Koushede, V., Power, S. A., Morton, T. A., & thøgersen, M. H. (2024).**
*Fordrevne ukrainere i Danmark II. Resultater fra DARECO (The Danish Refugee Cohort)*,
Københavns Universitet.

**KL, Røde Kors, DRC Dansk Flygtningehjælp. (2023).**
*Danmarks modtagelse af flygtninge fra Ukraine - hvad har vi lært?* 1. udgave. Kommuneforlaget A/S.

**Lev-Ari, R. K., Aloni, R., & Ari, A. B. (2024).**
Children fleeing war-exploring the mental health of refugee children arriving in Israel after the Ukraine 2022 conflict. *Child abuse & neglect*, *149*, 106608.

**Li, S. S., Liddell, B. J., & Nickerson, A. (2016).**
The relationship between post-migration stress and psychological disorders in refugees and asylum seekers. *Current psychiatry reports*, *18*, 1-9.

**Ludvigsson, J. F., & Loboda, A. (2022).**
Systematic review of health and disease in Ukrainian children highlights poor child health and challenges for those treating refugees. *Acta Paediatrica*, *111*(7), 1341-1353.

**Lushchak, O., Velykodna, M., Bolman, S., Strilbytska, O., Berezovskyi, V., & Storey, K. B. (2024).**
Prevalence of stress, anxiety, and symptoms of post-traumatic stress disorder among Ukrainians after the first year of Russian invasion: a nationwide cross-sectional study.
*The Lancet Regional Health–Europe*, *36*.

**NKVTS. (2022).**
*Flyktninger fra krigen i Ukraina: Psykososiale konsekvenser, behov og tiltak den første tiden i Norge - Voksne og eldre*. Avrop 12. Rammeavtalen mellom NKVTS og Helsedirektoratet.
Rambøll. (2024). *SurveyXact*. Retrieved 17-06 from https://rambollxact.com/surveyxact

**Skevington, S. M., Lotfy, M., & O'Connell, K. A. (2004).**
The World Health Organization's WHOQOL-BREF quality of life assessment: psychometric properties and results of the international field trial. A report from the WHOQOL group.
*Quality of Life Research*, *13*, 299-310.

**Steel, Z., Chey, T., Silove, D., Marnane, C., Bryant, R. A., & Van Ommeren, M. (2009).**
Association of torture and other potentially traumatic events with mental health outcomes among populations exposed to mass conflict and displacement: a systematic review and meta-analysis.
*Jama*, *302*(5), 537-549.

**UNHCR The UN Refugee Agency. (2023).**
*Dialogue with refugees from Ukraine in the Nordic countries*.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar.**
Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om midlertidig opholdstilladelse til personer, der er fordrevet fra Ukraine, 5. apríl 2022, nr. 412

**WHO. (2004).**
*The world health organization quality of life (WHOQOL)-BREF.*

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

Skálatrøð 20 | Postrúm 264 | FO-110 Tórshavn | www.utlendingastovan.fo